# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um
## Jónhild Petersen í Sandavági

Ikki vardi tað okkum, tá vit sóu fløggini veitra í hálvari stong hendan vakra sunnumorgunin tann 30. august, at boð høvdu verið eftir Jónhild kvøldið fyri. Bygdarfólkið hevði júst hildið summardag og heilsað heystinum vælkomið við øllum tí, ið tað hevur at bjóða. Men rætt var, fløggini veitraðu fyri okkaru góðu vinkonu, Jónhild, sum alt ov ung fekk álvarsama sjúku. Tolin sum hon var, bar hon sjúkuna og misti ikki mótið, men tók hvønn dagin, sum hann lagaði seg. Men sjúkan gjørdi nógv um seg og eftir stutta sjúkratíð, vórðu hennara dagar á foldum taldir.

Jónhild hevur verið ein av okkum nýggju í bindiklubbanum í nógv ár. Vit minnast aftur á hugnaligar løtur, har tosað varð bæði um gama og álvara, og har vit skemtaðu og flentu í ovfarakæti eftir onkrum, sum vit kanska sjálvar høvdu gjørt ella upplivað. Vit minnast tær hugnaligu løtur í hennara heimi uppi á Steig, har vit merktu, hvussu væl Jónhild dámdi at hava bindiklubba og varta okkum upp. Vit minnast jólabindiklubbarnar, sum nakað serligt, tá vit sum børn, við stjørnum í eygunum, royndu at finna út av, hvør hevði mandluna.

Jónhild var still og frintlig og altíð við tí góða orðinum; talaði ongantíð ilt um nakran. Vit merktu, hvussu góð hon var við síni; mannin, børnini, ommubørnini, versonin og systrarnar Hon fylgdi væl við, tá Annfinnur og dreingirnir vóru til skips, hvar teir vóru og hvussu nógv teir fiskaðu. Dótturina, Kristiannu var hon sera góð við og stolt av. Vit merktu eisini, at Kristianna hevði umsorgan fyri mammu síni. Jónhild tosaði nógv um ommubørnini, og henni dámdi væl at hava tey rundan um seg. Tá vit vóru uppi hjá Jónhild, var tað ofta at hon, við einum blíðum eygnabrái, segði, tá vit fingu onkra sjálvtsama góða køku, at Kristianna hevur bakað.

Veðrið var av tí fagrasta, ikki ein ond rørdist, hendan dagin, Jónhild varð løgd til hvíldar her á foldum. Soleiðis, sum hesin dagurin var, soleiðis var Jónhild eisini sjálv, still, mild og góð.

Tað kennist tómligt, nú hennara stólur stendur tómur. Fyrstu ferð vit møttust aftur aftan á at Jónhild var farin, hildu vit eina stilla løtu til minnis um okkara góðu vinkonu.

Hvíl í friði góða Jónhild.

**Bindiklubburin**

## Dagurin

**15. oktober. Heiðveig**, deyð ár 1243. Hon var greivadóttir úr Bayern og giftist hertuganum Heinriki fyrtsa í Slesiu. Hon bygdi fleiri sjúkrahús og kleystur. Gav seg í nunnukleystur, har hon doyði. Hon varð skírd halgikvinna í 1267. Heiðveig er føroyska navnið fyri Hedvig. Navnið er upprunaliga týskt, samansett av tveimum orðum, sum merkja stríð og víggj.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at

**Turið Dahl**
ættað úr Havn
búsitandi í Ballerup

andaðist á Herlev sjúkrahúsi
mánadagin 12. oktober, 61 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Skovvejskirken, Digterparken 1, Ballerup leygardagin 17. oktober klokkan 14.30.

*Familjunnar vegna*
**Hanne, Niels, Sverri, Tóra, Monika og Emma**

†

**Anna Midjord**
Vági
ættað av Økrum

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánamorgunin,
63 ára gomul.

Kistan fer úr landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 17 umborð á »Smyril«.
Jarðarferðin verður úr Betel í Vági
leygardagin kl. 13.00.

Tey, ið ynskja at minnast Annu, kunnu lata Traktatgrunninum eina gávu, konto í peningastovnunum

### Gullbrúdleyp

Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov. í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

### Silvurbrúdleyp

Leygardagin 17. okt. kunnu hjúnini Aud og Siggvard, Joensen, halda silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í heiminum: Lauritsargøta 7, Tórshavn, frá kl. 17.

### 90 ára føðingardagur

Sunnudagin 18. okt. fyllir Poul Jacobsen, Svínoy, 90 ár. Dagurin verður hildin úti í Svínoy leygardagin 17. okt. kl. 19.

### 80 ára føðingardagur

15. okt. fyllur Malla Jacobsen, Norðragøta, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familiuni.

### 80 ára føðingardagur

Týsdagin 20. okt. verður Hildigarð Høghamar, Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 24. okt. á Hotel Eiði Frá kl. 18. Tey, ið vilja heilsa uppá Hildigarð verða biðin at siga frá á tlf. 423045 (Hildigarð), 283541 (Annsy), 229727 (Nomi) áðrenn 17. okt.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu
tá góði maður, pápi, 'verpápi og abbi okkara

**Eli Danielsen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Takk, Heri Joensen, prestur, fyri troystarík orð.
Vit takka sangarum berarum, kirkjutænarum og gravarum.

Takk, tit starvsfólk á B8, fyri tykkara hjálpsemi.

Takk fyri kransar, blómur og gávur til Hjartafelagið.
Takk øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Katrin**
**Páll og Súni**

†

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Sørensen**
ættaður úr Trongisvági
búsitandi í Tórshavn

andaðist í heiminum týsdagin, 82 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 19.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Kamilla, Tummas, Sigrid, Sofía, Maja og Sonja**

Tey, ið ynskja at minnast Hans, kunnu lata Hjartafelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.